## Henrik leitar eftir stigum



Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti, Henrik Larsen, hevur tað trupult í venjarastarvinum í Køge. Liðið hevur spælt tríggjar dystir í donsku 1. deild og hevur tapt allar.

- Í dystinum seinasta vikuskiftið høvdu vit nógvar stórar kjansir í fyrra hálvleiki, men vit megnaðu ikki at skora, og so taptu vit í seinna hálvleiki. Leikliga gongur tað framá hjá liðnum, og eg ivisti ikki í, at vit nú eisini fara at fáa stig, sigur Henrik Larsen.

Um vikuskiftið skal Køge spæla á heimavølli ímóti Ølstykke

## Anja Andersen til Roskilde

Danska hondbóltslegendan Anja Andersen flytir nú til Roskilde at arbeiða. Hon hevur seinastu árini verið venjari í Slagelse, sum gjørdist besta liðið í Europa, og nú skal hon endurtaka bragdið í Roskilde. Anja er framvegis í Slagelse, men næsta ár flytir hon til Roskilde DT, har hon fær fríar teymar at byggja eitt nýtt stórlið upp. Liðið hjá Anju verður ein yvirbygningur av hondbóltsfelagnum í Roskilde, og tí kann Anja hugsa fult og heilt um sítt egna lið.

# Fer at braka við Løkin

**Tað fer at braka við Løkin sunnudagin, tá tey bæði næstu liðini aftan fyri oddaliðið bresta saman. Ein sigur er eitt krav hjá báðum liðunum, sum bæði hava hvør sín mann uttan fyri við leikbanni**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Lagt er upp til eitt brak av einum dysti, tá NSÍ og HB bresta saman við Løkin sunnudagin. Liðini royna hvør í sínum lagi at fylgja oddaliðnum, og tískil er dysturin sunnudagin av alstórum týdningi hjá báðum liðunum.

NSÍ kann, um tingini laga seg eftir teirra høvdi, fáa EB/Streym aftur, og HB spælir fyri møguleikanum um at yvirhála NSÍ, soleiðis at teir kunnu vera liðið, ið skal trýsta EB/Streym í oddinum.

### Karsten Joensen í málið

Í dystinum seinast í móti fuglfirðingum, fekk Jens Martin Knudsen reytt kort og varð rikin av vøllinum. Ein rættiliga býtt útvísing, sum gamli landsliðsmálverjin tilognaði sær og liðnum, og sunnudagin kann hetta fara at kosta felagnum dýrt, tí Jens Martin Knudsen er tá leikbannaður og má sita yvir.

Í málið hevur NSÌ tó fingið ein fínan avloysara. Karsten Joensen skal verja NSÍ-málið, og í Runavík fegnast tey um at hava fingið so frægan mann inn fyri Jens Martin Knudsen.

Annars eru allir mans tøkir. Ongin skaði og onki leikbann, og tá Cristian Høgni Jacobsen ikki sær út til at hava trupulleikar við at raka málini í føroysku landskappingini, sær tað heilt gott út hjá vespunum.

### Jákup á Borg leikbannaður

Einasti maðurin hjá høvuðsstaðarfelagnum, sum má melda pass sunnudagin, er Jákup á Borg. Hann fekk fimta gula kortið í ár í dystinum móti EB/Streymi, og tískil sleppur hann ikki á vøllin í móti NSÍ.

Hetta er ein stórur missur hjá HB. Jákup á Borg hevur verið flúgvandi í ár, og eisini í landsdystinum móti Georgia var hann millum frægastu leikararnar hjá føroyingunum. Úr HB verður tó sagt, at maður kemur í mans stað og at teir eiga fleiri góðar mans, sum kunnu koma í hansara stað.

Men Jákup á Borg var ikki einasti HB-arin á landsliðnum mikukvøldið. Bæði Kári Nielsen og Janus Joensen spældu samfullar 990 minuttir, og eisini Rógvi Jacobsen spældi stóran part av dystinum. Spurningurin er so, um møðin enn situr í beinunum sunnudagin.

Í HB verður ásanna, at dysturin er av ovurhondsstórum týdningi.

– Tað er vind eller forsvind, so einfalt er, verður sagt úr Havnini, meðan teir í Runavík ikki taka so dýran men siga, at trý stig høvdu verið at fyritrekt.

## Nú byrjar Premier League

Leygardagin byrjar fremsta fótbóltskappingin í Onglandi aftur. Premier League er helst tann best umtókta fótbóltskappingin í heiminum, og nú verður aftur lagt til brots. Fyrstu dystirnir verða spældir leygardagin, og nú sum áður er tað Chelsea, sum er favorittur til at vinna meistaraheitið. Fyrsti dysturin hjá Chelsea verður ímóti Manchester City sunnudagin. Liverpool fær høvi at spæla fyrsta dystin leygardagin, tí longu klokkan 12.45 spælir Liverpool ímóti uppflytarunum úr Sheffield United.

## Gerrard var skeivt brúktur

Liverpool-stjørnan Steven Gerrard sigur í samrøður við enska blaðið The Guardian, at hann treivst ikki at spæla á enska landsliðnum undir Sven-Gøran Eriksson. Støðan er ein heilt onnur, nú Steve McLaren er blivin venjari. Í vikuni vann Ongland heili 4-0 á Grikkalandi í fyrsta dystinum hjá McLaren sum venjari.

– Tað var fyrstu ferð, at eg veruliga kundi njóta at spæla á landsliðnum. Eg fekk at vita, at eg skuldi spæla á sama hátt, sum eg geri fyri Liverpool, og eg havi fingið nógv størri frælsi til at spæla frameftir, sigur Steven Gerrard.

Hann sigur við The Guardian, at Eriksson ofta brúkti hann á skeivum plássi.

– Heilt erligt, eg eri ein álopssinnaður miðvallarspælari og ikki ein álopsspælari av neyð, sigur Gerrard.

# Skála er væl fyri

**Bert ein spælari hjá Skála fær ikki spælt sunnudagin, og tað er ein óvanlig støða hjá felagnum, sum hevur verið illa plágað av skaðum í ár. ÍF hevur leikbann og sjúku á liðnum**

SKÁLA-ÍF
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu umførini er Skála farið at líkjast liðnum frá seinastu kappingarárunum, og ein orsøk til tað er, at liðið hevur fingið alt fleiri spælarar tøkar aftur. Nógvir skaðar hava plágað týðandi spælarar á liðnum, og tað hevur havt ávirkan á úrslitini.

Til dystin ímóti ÍF sunnudagin manglar bert ein spælari hjá Skála, og tað er Bjarni Jørgensen, sum ikki hevur spælt í longri tíð. Hann hevur verið skaddur í lærkrikanum, men nú verður roknað við, at hann kann byrja at venja aftur, og tí verður hann tøkur innan ov langa tíð.

Bárður Danielsen hevði leikbann ímóti B68 seinast, men hann er tøkur til dystin sunnudagin.

### Tveir ivasamir

Hjá ÍF stendur hampuliga væl til. Danski miðvallarin Christian Soelberg hevur ligið sjúkur í vikuni, og hann er ikki heilt komin á føtur aftur. Danjal Pauli Højgaard var eisini burtur vegna sjúku í gjárkvøldið, men í Fuglafirði vóna tey, at báðir verða klárir til dystin sunnudagin.

Ein spælari hevur leikbann, og tað er Frank Poulsen.